## Lyon best í Fraklandi

Lyon er fyri sættu ferð á rað franskur meistari í fótbólti. Hetta gjørdist veruleiki leygardagin, tá Toulouse tapti sín dyst móti Renne. Lyon hava verið mest sum einaráðandi í fronskum fótbólti í drúgva tíð, og munurin til næstu liðini undirstrikar eisini týðiliga hendan veruleikan. Enn eru nevnliga seks umfør eftir í bestu fronsku røðini, men gullið er tað so eingin annar, sum kann nerta við.



## Inter eru meistarar

Marco Materazzi kom veruliga í fokus, tá hann seinasta summar varð stútaður um koll av Zinedine Zidane. Sunnudagin var verjuspælarin aftur í fokus, men hesa ferð eitt meira positivt av slagnum. Materazzi skoraði nevnliga bæði málini, tá Inter á útivølli vann 2-1 á Siena. Og tá Roma samstundis tapti móti Atalanta, førdi sigurin italska meistaraheitið til Inter. Og á pappírinum er hetta annað árið á rað, at Inter er italskur meistari. Grundað á stóru dómaragøluna í fjør varð gullið hjá Juventus nevnliga tilskrivað Inter.

HB-KÍ 3-1 (3-1):

# Klassamunur í Gundadali

HB

KÍ



*Gunnar Nielsen hevur verið flúgvandi hjá KÍ seinatu tíðina, men hesa ferð slapp hann ikki at seta dagsskránna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Lagt var upp til spennandi dyst í eyðkendu uppgerðini ímillum javnaldrarfeløgini í Gundadali sunnudagin, men KÍ fekk einki gjørt við føroyameistararnir**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Høg leikferð við tøttum nærdystum plagar at eyðkenna dystir millum HB og KÍ, men sunnudagin var hvørki av hesum á lepanum. KÍ sýndist ikki til at tíma at spæla fótbólt, og tað gav HB møguleikan at spæla sítt spæl og settust teir á dystin frá fyrsta bríksli.

Tí kom tað heldur ikki óvart á nakran, tá Rókur av Fløtum Jespersen legði heimaliðið á odda eftir bert sjey minuttum. Hann fekk eitt flatt innlegg, og úr stuttari fjarstøðu sveik hann ikki.

Leiðslan hjá HB helt sær tó ikki leingi, tí KÍ svaraði aftur beinanvegin. Tríggjar minuttir seinni fekk KÍ fríspark beint uttanfyri brotsteigin hjá HB. Gunnar Nielsen rullaði frísparkið til síðuna, og við einum fløtum kanónskoti sendi Kaj Ennigarð bóltin í netið til 1-1.

### HB traðkaði til

Útjavnandi málið hjá KÍ sá út til at geva HB eitt spark í endan. Teir gjørdust meiri málsøknir og størsti parturin varð uppspæling í høgri síðu, har stórspælandi Mortan úr Hørg var ógvuliga ágrýtin fram eftir vøllinum. Trýstið gav úrslit í 22. minutti, tá ið Christian Høgni Jacobsen hegnisliga varð spæld leysur, og lyfti bóltin upp um Meinhardt Joensen í KÍ-málinum.

2-1 sá leingi út til at verða hálvleiksstøðan, men so varð tó ikki. Í sjálvum 45. minutti varð Rókur feldur í brotsteiginum. Eins og allan dystin ígjøgnum var Eiler Rasmussen ivaleysur í hesi støðuni og dømdi brotsspark. Hetta setti Jákup á Borg trygt uppundir nettakið, og so kundi hann senda lið sítt til hálvleiks við einari 3-1 leiðslu

### Samanbrestur tók luftina

HB kom best frá byrjan í seinna hálvleiki. Tó gingu bert fimm minuttir, áðrenn ein drúgvur steðgur kom í spælið eftir eina óhepna hending. Rógvi Jacobsen fekk eina fríspæling, og hevði bert KÍ-málverjan eftir at knógva. Beint uttan fyri brotsteigarmarkið sprakk bólturin høgt. Málverjin var komin út og fekk ikki nýtt hendurnar, og Rógvi Jacobsen hevði nógva ferð og fekk ikki støðga. Úrslitið var, at teir rendu høvdini saman. Báðir smullu í vøllin og báðir fingu hæstiliga viðgerð. Rógvi slapp við bindi um høvdið, meðan Meinhardt mátti flytast á sjúkrahúsið. Inn kom Mathias Samuelsen at verja KÍ-málið, og hetta gjørdi hann bæði gott og trygt.

Ógvusligahendingin tóktist at taka luftina úr leikarunum, tí eftir drúgva steðgin var ikki serliga ágangandi spæla at síggja. KÍ-verjan sá til tíðir alt ov tunn út, meðan HB ikki rakti málið tað, ið eftir var av dystinum. Einki mál kom í seinna hálvleiki og harvið vann HB seg upp á sjey stig, sum er ájavnt við B71, KÍ og GÍ.

## Fekk tríggjar pentur eftir dystin

Ógvusligasta hendingin í Gundadali sunnudagin var uttan iva, tá Rógvi Jacobsen og Meinhardt Jacobsen rendu saman. Hetta tá Rógvi elti eina langa sending, sum KÍ-málverjin hinvegin royndi at rudda burtur.

- Eg haldi, at vit báðir eru púrasta fokuseraðir upp á bóltin. Fyri mítt viðkomandi kann eg bara siga, at eg roknaði við, at eg hevði møguleika at stúta bóltin í netið, og tí satsaði eg alt. Meinhardt heldur helst tað sama, og so renna vit beint í hvønn annan, sigur Rógvi Jacobsen um tilburðin.

Tað sá ógvusligt út, tá Rógvi varð liggjandi, bløðandi, á vøllinum, men sjálvur var hann mest sum alt fyri eitt greiður um, at hann fekk spælt víðari.

- Eg var eitt lítið sindur í ørviti, men eg visti, at talan var ikki um heilaskjálvta. So eftir at hava fingið bandasju um høvdið, var eg klárur at fara aftur á vøllin, sigur Rógvi.

KÍ-málverjin mátti hinvegin fara av vøllinum við heilaskjálvta. Báðir vórðu spælararnir á Sjúkrahúsinum um kvøldið, har løstirnir vórðu seymaðir.

**-mørk**



*Hóast Rógvi sjálvur fekk ein ordans snudd, so hevði hann eisini stundir at taka sær av liðfeløgunum. Her kannar hann eftir, hvussu standurin er hjá Christian Høgna Jacobsen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*